## Eingin trýr Fabregas

Hóast Cesc Fabregas hevur gjørt greitt, at hann heldur fram at spæla fyri Arsenal í Onglandi, ganga áhaldandi søgur um, at hann skal skifta til Barcelona. – Tað er eingin orsøk at tosa um mína framtíð, og eg veit ikki, hvaðani allur slaturin kemur. Eingin trýr mær, men eg eri glaður fyri at verða í Arsenal, og eg havi ongar ætlanir um at skifta felag, sigur Fabregas við Sporting Life.




## Iniesta úti ímóti Arsenal

Í vikuni spæla Arsenal og FC Barcelona fyrstu fjórðingsfinaluna í Champions League. Men ein av stuðulsspælarunum hjá Barcelona, Andres Iniestea, verður ikki við í dystinum. Hann fekk ein snudd í dysti um vikuskiftið, og fær ikki spælt hesa fyrstu vikuna. Í FC Barcelona verður vónað, at Andres Iniesta aftur kann verða tøkur hjá liðnum til seinna dystin ímóti Arsenal, sum verður tann 6. apríl.



Málskjúttin hjá EB/Streymi, Arnbjørn T. Hansen, í luftdysti við NSÍ-miðverjan, Jóhan Troest Davidsen, í dystinum við Margáir leygardagin

Mynd: Sofus D. Johannesen

# NSÍ bara ikki víðari

**Arnbjørn T. Hansen var einsamallur málskjútti, tá EB/Streymur vann á NSÍ, sum seinnu árini hevur átt lítlan leiklut í steypakappingini**



einsligtir@kallnet.fo

**Hilmar Jan Hansen**

Í vánaligum líkindum og eftir longda leiktíð eydnaðist EB/Streymi leygardagin við 1-0 sigri á NSÍ at tryggja sær víðari luttøku í steypakappingini. Úrslitið var nett tað sama, sum tá NSÍ í fyrsta umfari í 2008 vitjaði EB/Streym.

Talan var um tætta uppgerð, og málmøguleikar vóru í báðum endum. Arnbjørn T. Hansen skoraði sigursmálið, tá hann við høvdinum stýrdi frísparksinnleggi úr vinstru síðu frá Hans Paula Samuelsen í netið.

Úrslitið var staðfesting av gongdini í steypakappingini seinnu árini hjá báðum feløgunum. Trý tey síðstu árini hevur EB/Streymur verið í finaluni. Í fjør tapti samansetta liðið ímóti Víkingi, og tey bæði undanfarnu árini vann EB/Streymur á fyrst HB og síðani B36.

Luturin hjá NSÍ hevur hesi árini verið lítil í steypakappingini, og lutakastið hevur ikki verið serliga heppið: Fýra tey síðstu árini hevur NSÍ bara spælt ein steypadyst hvørt árið, tá mótstøðuliðini hava verið HB og EB/Streymur – tvær ferðir í part.

NSÍ skal leita heilt aftur til 2006 fyri at finna ein sigur í steypakappingini, 4-1 í Sørvági, áðrenn tað í øðrum umfari endaði við 1-0 tapi á Skála.

Á liðnum hjá EB/Streymi vóru Bjarni Jørgensen og Kristoffur Jakobsen nýggir, og hjá NSÍ var Andras Gango nýggjur málverji og Heðin á Lakjuni nýggjur vongverji í vinstru síðu.

# Klæmint var omaná

**B36-liðformaðurin skoraði sigursmálið ímóti HB, og tað eydnaðist honum væl at ansa eftir HB-liðformanninum**

Tað verður ikki í ár, at sigursvanda HB fyri fyrstu ferð fær sítt navn innritað í Løgmanssteypið, sum nú verður spælt um. HB-luttøkan á hesum sinni vardi bara 90 minuttir, tí B36 varpaði grannarnar úr kappingini.

Sigursmálið í 1-0 sigrinum hjá B36 skoraði liðformaðurin, Klæmint Matras, tá hann stutt eftir steðgin beindi hornasparksinnlegg frá Jákupi á Borg í málið.

B36-liðformaðurin og HB-liðformaðurin, Fróði Benjaminsen, hava ofta spælt yvir av hvørjumøðrum, men hesa ferð var Klæmint omaná. Fróði plagar at vera málsøkin, men hann skoraði ikki ímóti B36, og at Klæmint var so grammur eftiransari, var ein av orsøkunum til, at spælið hjá HB var lítið sannførandi.

Á báðum liðum vóru nýggir spælarar at síggja. Hjá B36 var Dimitrije Jankovic sera sannførandi miðverji, og Hjalgrím Elttør var eyðsýndur í vinstru síðu, har hann ofta breyt ígjøgnum.

Hjá HB var næstan helvtin av liðnum nýggj, um sammett verður við síðsta kappingarár: Rógvi S. Holm, Tórður Hreiðarsson, Levi Hanssen og Símun Samuelsen spældu allir sín fyrsta dyst fyri HB, og Tór-Ingar Akselsen var aftur at síggja í høvuðsstaðarfelagnum, eftir at hann hevur spælt við 07 Vestur.

**hil**

## FAKTA UM DYSTIRNAR

**HB-B36 0-1 (0-0)**
**0-1:** Klæmint Matras, 49.
**Dómari:** Petur Reinert

**Undrið FF-ÍF 0-1(0-0)**
**0-1:** Karl Løkin, 60.
**Dómari:** Alex Troleis

**AB-KÍ 3-1** – **eftir longda leiktíð 1-1 (0-0)**
**1-0:** Evrard Blé, 60.
**1-1:** Henry Heinesen, 80. (br.)
**2-1:** Evrard Blé, 103. (br.)
**3-1:** Kenneth Jacobsen, 113.
**Reytt kort:** Nikolai Eriksen, AB, 68., Sørmund Kalsø, KÍ, 103.
**Dómari:** Ransin Djurhuus

**B71-Víkingur 2-4** – **eftir longda leiktíð, 2-2 (0-1)**
**0-1:** Atli Gregersen, 40.
**1-1:** Bojan Zivic, 68.
**2-1:** Símin Hansen, 75.
**2-2:** Súni Olsen, 80.
**2-3:** Súni Olsen, 101. (br.)
**2-4:** Súni Olsen, 105.
**Reytt kort:** Símin Hansen, B71, 101.
**Dómari:** Eiler Rasmussen

**EB/Streymur-NSÍ 1-0** – **eftir longda leiktíð, 0-0**
**1-0:** Arnbjørn T. Hansen, 100.
**Dómari:** Páll Augustinussen

**B68-07 Vestur 3-0 (0-0)**
**1-0:** Jóhan Dávur Højgaard, 51. (br.)
**2-0:** Poul N. Poulsen, 75.
**3-0:** Ndende Adama Gueye, 89.
**Reytt kort:** Eli Falkvard, 07 Vestur, 62.
**Dómari:** Dagfinn Olsen

**FC Hoyvík-TB 2-0 (1-0)**
**1-0:** Jørgen Meitilberg, 37.
**2-0:** Bogi Hermansen, 64.
**Dómari:** Jóhan Petur Michelsen

**FC Suðuroy-Skála útsettur**